# **London** by night

## LONDON

London er, við sínum stórslignu bygningum og vøkru grønu plássum, ein vakur og hugnaligur býur um dagin. Tann uppliving, ið ein fær av at ganga í býnum um dagin, er stór í sjálvum sær. Sigast má tó, at upplivir ein ikki býin, tá ið myrkrið hevur lagt seg yvir hann, so er upplivilsið av London ikki fullkomið.

Um kvøldið broytir býurin lit. Teir annars so gráu og brúnligu bygningarnir gerast nú litríkir við alskyns ljósum og eru enn stórfingnari, enn teir eru í dagsljósi.



Chinatown liggur í Soho, beint við Leicester Square, og er kent fyri tey mongu matstøðini, pubbir og klubbar

### Leicester Square

Leicester Square er í dag miðdepilin í London. Gøtan liggur norðan fyri Trafalgar Square, eystan fyri Piccadilly Circus og vestan fyri Covent Garden.

Leicester Square er ein sera skundmikil gøta, og her hittir ein fólkasløg úr so at siga øllum heiminum. Tað er ikki uttan orsøk, at gøtan er so skundmikil. Hevur ein hug til bert eitthvørt slag av undirhaldi, so finnur ein tað á Leicester Square.

Leicester Square hevur tó ikki altíð verið so lokkandi. Tað var ikki fyrrenn mitt í 19. øld, at bretar veruliga sóu, at hetta var gøtan, ið skuldi standa fyri tí nógva undirhaldinum, ið London longu tá hevði at bjóða.

Nógvir kendir harrar, so sum Shakespeare, Charlie Chaplin, Sir Isaac Newton og William Hogarth hava búð á Leicester Square. Á gøtuni kemur ein framvið fleiri standmyndum, millum annað einari av Charlie Chaplin.

### Tónleikaframførslur

Tað eru í hópatali av tilboðum til tann ferðandi at finna á Leicester Square.  Er tað tónleikur, ið hugtekur ein, so er at fara til ein musical í einum av teimum mongu sjónleikarahúsunum ella á eina konsert, sum ein bæði kann finna inni sum úti.

Til ein musical kunnu øll fara, tí tilboðini, eisini í summar, eru nevniliga so mong og so ymisk -  heilt frá kendum Disney titlum sum Peter Pan og The Lion King og til góðar kendar søgur sum Les Miserables og Blood Brothers. Eisini eru musicals av tí lættara slagnum sum t.d. Mamma Mia og Grease.

Tá ið tosað verður um musicals, so er torført at sleppa uttan um tann hjá Andrew Lloyd Webber, nevniliga Phantom of the Opera. Hesin hevur verið spældur í góð 20 ár í Bretlandi, og verður hann eisini á palli í summar.

Vilt tú vita meira um hesar og aðrar musicals, so kanst tú fara inn á heimasíðuna www.londonmusicals.dk

Viðvíkjandi konsertum, so er úrvalið eisini sera stórt á hesum øki. Hvørt ár eru tað fleiri tónleikafestivalar í London, og tessvegna vitja fleiri kend tónleikanøvn London. Av teirri orsøk, at tónleikaúrvalið er so stórt, kann ein altíð finna júst ta tónleikagrein, ið einum dámar best.

Fleiri av konsertunum verða framførdar á Hyde Park, sum er størsta grøna plássið í miðbýnum í London, og her fara m. a. stór nøvn sum Blur, Bruce Springsteen og Neil Young at framføra í summar.

### Matstovur og klubbar

Í London er ikki neyðugt bert at eta enskan mat, tað er bert ein møguleiki av fleiri. Í London eru matstovur á hvørjum horni, ein skal ikki ganga langt fyri at koma frá einari matstovu til aðra. Matstovurnar eru sera ymiskar, og aftur á hesum økinum fær ein tað, ein hevur hug til. Um tað skal vera fínt og dýrt ella gott og bíligt, kinesiskt, indiskt, franskt, kubanskt ella orientalskt, so er tað at finna í London.

Er tað kinesisk ein kundi hugsað sær, so er Soho rætta staðið. Soho er eitt minni øki miskeiðist í London. Í Soho eru fleiri ymiskar mentanir, og finnur ein millum annað Chinatown her, við fleiri kinesiskum matstovum. Í Soho er ídnaður, undirhald av ymiskum slag, rík og fátæk, ja, alt hvørt um annað, og tað er júst hetta, ið ger Soho til nakað serstakt. Soho er staðið, ið mong fara til, fyri at stytta sær stundir og stuttleika sær. Her finnast matstovur frá nógvum ymiskum londum, so sum Kina og India, og hevur ein tørv á at sløkkja sær tostan, so eru ovmikið av barrum og klubbum í Soho. Her kunnu nevnast Madame Jojos, ið hevur bæði DJ og livandi tónleik og Punk Nightclub, ið er ein klubbi, hagar kend fólk sum t.d Kate Moss og Kelly Osbourne av og á vitja fyri at stytta sær stundir.

### Covent Garden

Eitt annað pláss í London, ið hevur nakað tað sama at bjóða sum Leicester Square, men tó má nevnast, er Covent Garden. Covent Garden liggur eisini í hjartanum av London. Í Covent Garden finnur tú millum annað biografar, sjónleikarahús, handlar, cafféir. Ein sær dugnalig fólk vísa síni kynstur á opnari gøtu, har eru diskotek, drykkistøð, ið strekkja seg frá siðvandum bretskum pubbum til fín fronsk vínstøð. Drykkjustøðini eru væl vitjað, og á fleiri av teimum er eisini møguleiki fyri at fáa eitthvørt til matna. Flestu pubburnar bjóða Happy Hour.

Kenda kongaliga operahúsið er eisini á Covent Garden. Her er møguleiki fyri at síggja og hoyra kongaligu operaina ella kongaligu balettina framføra.

### Annars….

Um ein ikki hevur hug at seta seg inn á eina pubb, barr, café, matstovu, fara í biograf ella til ein mucical ella sjónleik, so er tað, í sær sjálvum, nóg mikið, bert at ganga runt á Leicester Square ella Covent Garden. Møguliga keypa sær ein stóran ís afturvið einum kaffimunni og seta seg afturá á einum av mongu uttandura café-stólunum. Seta seg niður í góða summarveðrinum, og bert njóta góða samveru og góða tónleikin, ið kemur frá onkrum, ið framførir á gøtuni. Hetta er í sjálvum sær ein ógloymandi uppliving.



Metbar liggur á Hydepark og er serliga væl dámt av kendum fólkum



Í Covent Garden sært tú ofta fólk upptraðka á gøtuni